## Pensjón til fiskimenn

Í Grønlandi er fiski- og veiðimannafelagið KNAPK farið undir ar kanna møguleikarnar fyri at útvega sínum umleið 2.400 limum eina pensjónsskipan. Tað verður gjørt í samstarvi við arbeiðsgevarafelagið eftir einari avtalu, sum partarnir gjørdu fyri stuttum. Felagið hjá teimum grønlendsku fiski- og veiðimonnunum er meiri enn 50 ára gamalt, men kortini hevur felagið onga pensjónsskipan fyri limirnar. Formaðurin, Leif Fontain (myndin), ásannar fyri KNR, at tíðin er komin til at fáa limunum eina tílíka skipan.



## Ísland fær samráðingar

Tann 24. februar fer ES-nevndin at hava fund, og millum málini á dagsskránni er tann íslendska umsóknin um samráðingar um limaskap í samveldinum. Tíðindastovan Reuters skrivar frá sínum keldum, at nevndin fer at mæla samveldinum til ar taka upp samráðingar við íslendingar. Tíðindastovan endurgevur íslendskar myndugleikar fyri at hava sagt, at samráðingar um limaskap fara at taka millum 12 og 24 mánaðir. Tann 16. juli í fjør samtykti Altingið við teprum meiriluta at søkja um limaskap í ES. Tá roknaði stjórnin við, at samráðingar um limaskap kundu byrja tíðliga í ár.

# Sjúkrahúsið fyllist við fólki

**Portørarnir í verkfalli játta at fara eftir sjúklingum, sum skulu leggjast inn. Men teir nokta at flyta fólkini heimaftur. Úrslitið er, at fleir viðgjørd fólk eru á Landssjúkrahúsinum**

VERKFALL

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Verkfallið hjá portørunum á Landssjúkrahúsinum fær fleiri og fleiri avleiðingar.

Nú eru posarnir av skitnum klæðum og brturkasti so nógvir, at leiðslan er trongd upp í ein krók.

Allan fyrrapartin hevur leiðslan sitið á fundi og skuldi koma við onkrum útspæli, men tað eydnaðist ikki at fáa nakran í talu vegna fundarvirksemi.

Sambært portørunum ætlað leiðslan týsdagin at áleggja trimum yvirlæknum at fáa skitnu klæðini í vask, men portørarnir søgdu nei.

Leiðslan vísit til eitt danskt skriv, har stendur, at skitin klæðir mugu ikki longur enn tveir dagarnar, men í føroysku reglunum stendur einki dagatal, og portørarnir halda seg til føroysku reglurnar, sigur Rani í Líð, álitismaður hjá portørunum.

Síðan verkfallið byrjaði fyri 12 døgum síðan, hava portørarnir í fleiri førum flutt sjúklingar á Landssjúkrahúsið.

- Sjálvandi liggja vit kki fólk liggja og líða, men tá ið tey eru liðugt viðgjørd, má onnur loysn fáast. Tað er ikki bráðfeingisarbeiði, sigur Rani í Líð.

Yvir fyri portørunum hevur leiðslan gramt seg um, at so nógv liðug viðgjørd fólk eru a Landssjúkrahúsinum, og at hetta hevur plásstrot við sær.

Svarið hjá portørunum var, at er plásstrot, ber til at lata stongdu deildina A3 upp og hýsa fólki har.



*Landssjúkrahúsið fyllist við skitnum klæðum, burturkasti og fólki, sum ikki verða flutt heim*

# Blámusoppur í barnagarðinum

**Hølini hjá útibarnagarðinum í Trongisvági eru fyribils stongd, meðan tey vera reinsað fyri blámusopp**

HEILSA

*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Týsdagin varð avgerðin tikin um at steingja hølini hjá útibarnagarðinum hjá Tvøroyrar kommunu. Barnagarðurin hevur høli í kjallaranum í skúla- og ítróttarhøllini í Trongisvági.

Tað byrjaði, at starvsfólk gramdu seg, tí tey høvdu verið sjúk og høvdu illgruna um soppavøkstur.

Starvsfólkini fingu skundað undir at fáa kanning gjørda, og nú er staðfest, at har er blámusoppur.

Kommunan hevur havt fund fyri foreldraumboini, sum hava fingu frágreiðing um, hvussu vorðið er.

### Ein leki

Tað vísti seg, at eitt rør í kjallaranum hevur likið, og hildið verður, at soppurin stavar frá tí lekanum.

Kommunan hevur eisini gjørt mátingar, og royndirnar verða sendar Dansk Teknologisk Institut.

Nú verður lekin tettur, og tá ið hølini ru reinsað, verða gjørdar nýggjar mátingar.

Útibarnagarðurin heldur nú til í forhøllini í skúla- og ítróttarhøllini og hevur eisini fingið eina aðra stovu at vera í.

24 børn ganga í barnagarðinum.

Malla Dam, forkvinna í sosialu nevnd og Kristin Michelsen, borgarstjóri halda ikki nakran vanda vera fyri, at soppurin hevur breitt seg uppeftir í bygningingum. Soppavøksturin er heldur ikki so nógvum sum eitt nú í skúlanum á Giljanesi.

### Børn hava verið sjúk

Sum nevnt vóru tað starvsfólk, sum gjørdu vart við illgruna sín um soppavøkstur. Nú aftaná hava nøkur foreldur sagt, at børn teirra hava havt ilt í høvdinum, ilt í hálsinum og havt mist málið. Slíkt, sum kundi bent á soppavøkstur, sigur Malla Dam.

Arbeiðseftirlitið er kunnað um støðuna, men stovnurin fer ikki upp í málið, tá ið kommunan longu er farin at tetta lekan og síðan fer at reinsa hølini. Við at flyta børnini út úr hølinum, hevur kommunan borið seg rætt at, sigur Arbeiðseftirlitið.



*Útibarnagarðurin heldur til í høllini í Trongisvági*